## GÍ tók okkum á bóli

Hóast nýggi VB-venjarin, Ole Andersen, sjálvandi ikki var nøgdur um at tapa 3-0, so ásannaði hann, at sigurin hjá GÍ so ruddiliga var uppiborin.

– Eg haldi, at mínir spælarar gjørdust bilsnir av GÍ. Teir spældu frá fyrsta minutti við fullari ferð. Vóru skjótir á bóltinum og tordu at spæla hart. Og tað haldi eg kløkkaði okkara spælarar.

– Vit hava jú skift nógvar spælarar út, og eisini hava vit nýggja spælskipan, so tað tekur sína tíð at laga alt til. Nú mugu vit so greina hendan dystin, og rætta nøkur ting, og so fáa vit at síggja. Tað skal í øllum førum nógv meira enn bara eitt tap til, áðrenn nakar hjá okkum gevur skarvin yvir, heldur hann.

## Kavin bilti einki

Tað var ein ikki sørt lætnaður GÍ-venjari, sum Sosialurin fekk orðið á sunnukvøldið. Eftir at hann seinastu umførini í fjør stóð við stýrisvølin á einum GÍ-liði, sum fram til seinasta sekund var í akuttum niðurflytingarvanda, var talan um eina munandi lættari byrjan hjá Peturi Mohr.

– Tað kanst tú ætla. Hetta var júst ein slíkur dystur, sum tú skalt vinna. Ein sigur í hesum kundi líka sum flyta tankarnar rætta vegin, heldur enn at vit frá byrjan skulu hugsa um niðurflytingarvandan, og tí var trýstið sum so stórt undan dystinum.

– At vit so eisini mangladu fleiri spælarar, gjørdi ikki mína støðu lættari. Hvørki Pól Ennigarð, Gunnar Nielsen ella Hanus Jacobsen vóru tøkir hjá mær, og tí hevði eg einki ímóti at síggja kavan, sum kom niður í morgun. Ja, eg vónaði næstan, at hesin varð liggjandi, so dysturin varð útsettur, segði flennandi GÍ-venjarin at enda.

GÍ-VB/Sumba 3-0 (2-0):

# »Go« í GÍ

GÍ

VB

**Gøtumenn, sum fyri tað nógva vóru illa sperdir í fjør, fingu eina flúgvandi byrjan, tá einsamalla suðuroyarliðið í Formula-deildini varð sent heim við ongum**

FÓTBÓLTUR

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Lagið var framúr í Gøtu eftir dystin sunnudagin. Undan dystinum varð mett, at júst hesi bæði liðini helst fóru at teljast millum tey í tyngra endanum av kappingini, men hesa samanbering vildi GÍ ikki uttan víðari vera partur av.

### Tamir vágbingar

Hinvegin livdi VB væl og virðiliga upp til spádómin um, at teir verða í tunga endanum, tá árið er av. VB hevur seinnu árini sagt farvæl við nógvar av teimum, sum í nógv ár hava verið berandi, og tí kann vera trupult at lyfta arvin hjá mongu ungu spælarunum.

Kropsliga tóktust hesir heldur ikki vera gearaðir til fótbólt á Formula-støði, og tí komu teir rættiliga skjótt í dystinum undir stórt trýst.

Tvær ferðir fyri steðgin varð hetta eisini revsað, tá teir báðir ungu álopsmenninir hjá GÍ skutu vertirnir upp á 2-0. Fyrru ferðina slapp evnaríki Sverri Jacobsen rættiliga ótarnaður at stúta bóltin í netið, og stutt undan steðginum varð Jónreid Dalheim sendir leysur avstað.

### Magni á bakkinum

Eftir steðgin var spurningurin fyri tað mesta, hvussu trivaligur sigurin hjá GÍ skuldi verða. Marcin Dawyd í VB-málinum, sum í fjør spældi við GÍ, var sannur brandur, og uttan hansara hjálp kundi talan væl verið um tennis-tøl á máltalvuni.

Hóast talan kanska var um bíliga bakgrund, so tóktist GÍ í nógvar mátar at sannføra um, at landskappingin í ár neyvan verður eins soltin, sum hon var tað í fjør. Ikki minst tóktist Magni Jarnskor at stórtrívast í nýggja leiklutinum á vinstra bakki, har hann við góðum yvirblikki var partur í nógvum av tí, sum GÍ skapti niðaneftir.

Í hinum endanum var talan aloftast um tilvildarligar møguleikar, sum VB tó heldur ikki megnaði at gera sær dælt av. Spælið gekk aloftast ov seint, til at hetta veruliga kundi skapa nakrar trupulleikar, og lætti hópurin hevði heldur ikki kropsligu styrkina, sum er neyðug, um menn bara skulu stríða seg úr trupulleikunum.

At hava ein sannan brand í málinum, og ein sterkan defensivan miðvallara er í sjálvum sær sjáldan nóg mikið. Og í so máta hevur Ole Andersen enn eitt stórt arbeiði eftir at gera í Vági. Eisini hóast tað enn eru 26 umfør eftir at spæla.

**GÍ-VB 3-0 (2-0)**

1-0: Sverri Jacobsen
2-0: Jónreid Dalheim
3-0: Poul Arni Jacobsen



*GÍ legði fyri við fullari ferð, tá teir sunnudagin vunnu greiðan sigur á VB í fyrsta umfarinum av Formula-kappingini*

*Mynd: Álvur*

**Annars haldi eg**

*VB-spælararnir rigga betur í kalendaranum enn á vøllinum – Gøtumaður í sigursrúsi*